## Sløkkilið og kavaraarbeiði.

Sløkkilið hava ymiskar aðrar uppgávur enn at sløkkja eld.

Ein uppgáva er leiti– og bjargingaruppgávur, eisini á sjónum og í vøtnum.

## Vinnukavari.

Fyri at kunna arbeiða sum vinnukavari, sum leiti– og bjarginaruppgávur koma undir, eru treytirnar:

- At persónurin er minst 18 ár.
- At persónurin innanfyri tey seinastu 2 árini hevur staðið góðkent skeið í fyrstu hjálp.
- At persónurin skal vísa eina læknakanning (Dykkermedisinsk undersøgelse), ikki eldri enn 2 ár, har læknin váttar at persónurin er skikkaður sum kavari.
- At persónurin hevur vinnubræv frá Arbeiðseftirlitinum.

Vinnubræv frá Arbeiðseftirlitinum fæst, um persónurin hevur verið á skeið og staði roynd á einum skúla, ið er góðkendur, ella kann góðkennast, av Próvtøkunevndini, umframt omanfyri nevndu treytir.

## Nýggir vinnukavarar.

Tórshavnar sløkkilið hevur útbúgvið nakrar av sínum sløkkilismonnum til Bjargingarkavarar soleiðis, at teir lúka treytirnar í løgtingslóg nr. 46 frá 15. mai 2007 um kavaravinnu og kavaraútgerð.



**Skeiðsluttakarar:** Heiðrikur Christiansen, Heini Østerø, Regin Joensen, Kristján Eiriksson, Kári Sørensen,. Hans Dávid Hansen, Rúni Árting, Jóannes Weihe, Toni Dam.

**Harumframt.** Kim Berg, Safe Air Diving, Jan Kristoffersen, Próvtøkunenvdin og Kartni Jacobsen, Tórshavnar sløkkilið.

***Arbeiðseftirlitið***

***Apríl 2010***

# BJARGINGAR-KAVARAR